## Frágreiðing frá MAJ-nevndini 2008/09

Vit høvdu einar 6 fundir fram til 17. juli, har vit endaliga avgjørdu, hvør skuldi hava tær tríggjar M.A. Jacobsens virðislønirnar, síðani var ein fundur stutt fyri handanina, har tær seinastu orðingarnar vóru fingnar upp á pláss. Vit vóru fullsamd um at leggja okkum eftir at heiðra avrikum, sum troddu nýggjar leiðir og brúktu nýggjar miðlar – serliga royndu vit at hyggja at talgildum tilfari, men har var ikki nakað, sum uppfylti treytirnar fyri at verða heiðrað. Vit gjørdu eisini av á fundinum 17. juli, at eingin bók ella mentanarligt avrik, sum kom út/ fram eftir 17. juli var við í hesi innstilling.

Hesi vóru heiðrað í 2008:

Virðisløn M.A.Jacobsens fyri yrkisbókmentir fekk Hanus Kjølbro fyri bókina "Veðurlæra" við hesi grundgeving: At duga at skyna á veðri og sjóvarfalli hevur í øldir verið avgerandi fyri lív og trivnað í Føroyum, og neyv vitan á hesum øki hevur altíð verið høgt í metum millum manna. Við bókini "Veðurlæra" hevur Hanus givið øllum føroyingum ein góðan møguleika at læra um øll hesi viðurskifti á einum greiðum og góðum føroyskum máli og við frálíkum heimligum myndum og sigandi tekningum. Umframt at greiða frá veðri og havi við Føroyar, greiðir Hanus okkum eisini frá veður- og havviðurskiftum aðrastaðni, líka frá pólísinum til tropisku ódnirnar og frá uttasta lagnum á háhválvinum niður til djúpastu havstreymar.

Virðisløn M.A. Jacobsens fyri fagrar bókmentir fekk Sólrún Michelsen fyri "Tema við slankum" frá 2007 við hesi grundgeving: sum fyrsta roynd høvundsins at skriva til vaksin ber hendan skaldsøgan boð um, at føroyskar bókmentir við Sólrún eru á ótroddum leiðum. Í frásøgn um gerandisdagin hjá einari gentu í rembingar- og broytingartíðunum í fimmtiárunum lýsir skaldsøgan modernaðu Føroyar frá einari síðu, sum vit ikki hava fingið lýsta áður. Sólrún letur fínliga í orð tað ósigiliga og viðbrekna, sum ofta verður skúgvað til viks og burturtrongt, tí tað er trupult at seta orð á og sárt at viðurkenna. Samanumtikið hevur tað eydnast Sólrún Michelsen framúr væl at lýsa skuggasíðu mannalívsins í einum listarliga væl úr hondum greiddum verki við fjøltýddari søgugongd og mosaikkkendari bygging.

Virðisløn M.A. Jacobsens fyri mentanaravrik fekk Anna Kirstin Thomsen við hesi grundgeving: Anna Kirstin er eldsálin, sum lívgar og ríkar, har hon virkar. Tað veri innan tónleik, undirhald, ella tá ið hon lærir fólk kring landið at dansa. Við áhaldni og hugflogi, skynsemi og stórsinni, hevur Anna Kirstin tikið stig til at umvæla, varðveita og lata upp dyrnar til ein týðandi part av mentanararvi okkara: bygningarnar hjá Kongaliga einahandlinum á Tvøroyri. Um hesar karmar er sprottin ein søguligur og nútímans mentanarpallur og eitt livandi ungdómshús. Her stíga føtur, ið undan fóru, inn aftur í ringin, og saman trína vit dansin inn í framtíðina.

Eingin fundur hevur verið síðani mentanarvirðislønirnar vóru latnar.

Vár í Ólavsstovu